KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Undirskrift formansins:_____

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 24.06.2021 kl. 17:30
Málnr.: 20/01212 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
112/21	18/01396-72	Broytan av reglugerð - Mentanarhúsið í Klaksvík
113/21	21/00360-8	Nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum - reglugerð
114/21	21/00754-1	Rakstrarstaðið "Integratión" flytast frá kontubólki 1 til kontubólk 2 – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
115/21	21/00361-7	Møguligur forskúli – lýsing av møguleikum, fyrimunum og vansum
116/21	21/00770-1	Byggisamtyktarbroyting - partur av B9 til A18
117/21	21/00693-3	Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir
118/21	21/00669-3	Umsókn um makaskifti undir Fossum - matr.nr. 783g og 746b
119/21	17/00642-86	Søluprísur fyri matr.nr. 42b, Syðradal
120/21	21/00039-6	Byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 126a, Svínoy - Fuglark
121/21	21/00768-2	Umsókn um frávik frá kravi um tal av parkeringsplássum og stødd av lendi pr. íbúð í samb. við ætlaða bygging við Kirkjubrekku
122/21	21/00742-3	Atløgubryggja í Árnafirði, í samband við tunnilsarbeiði - Articon
123/21	21/00755-4	Ábøtur á ognirnar hjá Norðoya Fornminnasavni 2021 – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
124/21	17/00260-205	Ávís tillagan av verkætlan undir Hamri – *seinna viðgerð*
125/21	20/00068-31	Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e) – *seinna viðgerð*
126/21	21/00072-6	Vegir, Íløgur - staðfest inntøka í 2021 – *seinna viðgerð*
127/21	21/00073-9	Staðfest inntøka innan økið hjá UBN í 2021 – *seinna viðgerð*
128/21	21/00622-1	Eykajáttan til NBH 2021 – *seinna viðgerð*

Til viðgerðar

112/21
18/01396-72 Broytan av reglugerð - Mentanarhúsið í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	112/21

18/01396-72 Broytan av viðtøkum - Mentanarhúsið í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Á stýrisfundi 1. juni 2021 hjá grunninum Mentanarhúsið í Klaksvík varð viðtikið at broyta viðtøkurnar soleiðis – víst við reyðum niðanfyri:

Leiðsla
§ 3

Grunnurin verður umsitin av einum stýri við 7 limum, sum verða valdir soleiðis:

- Klaksvíkar Sjónleikarafelag velur ein lim,
- Norðoya Listafelag velur ein lim,
- Norðurlandahúsið í Føroyum velur ein lim,
- Vinnulívsráðið í Klaksvík velur ein lim,
- Klaksvíkar Býráð velur tveir limir, og
- Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu.

Stýrisfundir
§ 6

Stýrið hevur fund, so ofta verður hildið neyðugt, tó í minsta lagi 6 ferðir um árið, til at taka sær av teimum uppgávum, sum vanliga eru.

Formaðurin kallar inn til stýrisfund, antin sjálvur ella um ein av hinum stýrislimunum biður um tað.

Stýrið er viðtøkuført, tá ið minst ~~fýra~~ fimm av stýrislimunum eru til staðar, av teimum skal ein vera formaðurin. Fyri at eitt mál skal verða samtykt krevst, at fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti, smb. tó § 7 og 11 niðanfyri. Á stýrisfundi verða allar avgerðir at taka við vanligum meiriluta, men stendur á jøvnum, ræður formansins atkvøða.

Ársfundur
§ 7

Ein serstakur stýrisfundur verður á hvørjum ári hildin fyri 1. apríl (ársfundur). Á hesum fundi hava nevndirnar hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag, Norðoya Listafelag, Klaksvíkar Hornorkestri, Vinnulívsráðnum í Klaksvík, Klaksvíkar Tónleikarafelag, Norðurlandahúsinum og Klaksvíkar Býráð talurætt, meðan valdu umboð teirra hava atkvøðurætt. Ársfundurin verður lýstur minst 14 dagar frammanundan.

§ 12

Broyting av viðtøkum

Broyting av hesum viðtøkum skulu samtykkjast av stýrinum einmælt og skulu seinni góðkennast av Klaksvíkar Býráð.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við nevndu broytingum

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið, dagf. 21. juni 2021, einmælt samtykt.

113/21
21/00360-8 Nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum - reglugerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	15.06.2021	25/21
2 Fíggjarnevndin	22.06.2021	89/21
3 Integratiónsnevndin	23.06.2021	K-1/21
4 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	113/21

21/00360-8 Nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum - reglugerð

Frágreiðing um málið:
Við støði í higartil galdandi reglugerð fyri Integratiónsnevndina, samtykt av býráðnum 17. september 2015, og nýskipanina av nevndini, samtykt av býráðnum 25. mars 2021, hevur umsitingin samanskrivað viðfesta uppskot til reglugerð fyri Integratiónsnevndina, dagfest 03-06-2021, sum við hesum verður løgd fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar og samtyktar.

Lógargrundarlag:
-

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

Tilmæli:
Mælt verður til at samtykkja viðfesta uppskot til reglugerð fyri Integratiónsnevndina, dagfest 03-06-2021.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 3. juni 2021.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Nevndin tekur undir við E&B 15-06-2021.

Integratiónsnevndin 23. juni 2021:
Fundurin útsettur til eftir summarsteðgin.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá FíN 22-06-2021 einmælt samtykt.

114/21
21/00754-1 Rakstrarstaðið "Integratión" flytast frá kontubólki 1 til kontubólk 2 - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	15.06.2021	37/21
3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	15.06.2021	26/21
4 Fíggjarnevndin	22.06.2021	92/21
5 Integratiónsnevndin	23.06.2021	5/21
6 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	114/21
7 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	

21/00754-1 Rakstrarstaðið "Integratión" flytast frá kontubólki 1 til kontubólk 2

Frágreiðing um málið:
Í mars og apríl samtykti býráðið, eftir tilmæli frá avvarðandi nevndum, at skipa Integrationsnevndina eftir nýggja leistinum, sum er nærri útgreinaður í "Reglugerð fyri Integratiónsnevndina", dagfest 03-06-2021.

Fíggjarligi parturin av hesum býráðssamtyktum er soljóðandi:

> Higartil hevur virksemið innan integratiónsøkið verið fíggjað av játtan borgarstjórans. Talan er íalt um ein árligan rakstrarkostnað á uml. 100.000 kr., íroknað løn til samskipara, samsýning til integratiónsnevndina og fígging av átøkum, so sum International Day.
>
> Um hetta tilmæli um nýskipan av integratiónsnevndini og umsitingini á økinum fær politiska undirtøku, verður mælt til, at áðurnevnda, neyðuga játtan í inniverandi fíggjarætlan býráðsins fyri 2021 verður flutt millum kontur, frá verandi rakstrarstaði borgarstjórans og til trivnaðarøkið, har rakstrarstaðið integratión fær egna játtan.
>
> Eitt tilmæli um hetta – við nærri útgreiningum – verður at leggja fyri komandi fundarumfør í apríl og mai.

Við støði í hesi býráðssamtykt hevur umsitingin biðið um upplýsingar frá roknskaparleiðaranum um, hvar í kontuætlanini aðrar kommunur staðseta útreiðslurnar ísv. integratión; eitt nú hevur Tórshavnar kommuna staðsett rakstrarstaðið undir grein 2 "Almanna og heilsumál".

Grein 2 er ein høvuðskontubólkur, har ymsu rakstrarstøðini skiftuvís hoyra til Trivnaðarnevndina børn og ung ella Trivnaðarnevndina eldri & bústaðir, og tað er orsøkin til, at umsitingin velur at leggja hetta tilmæli fyri báðar trivnaðarnevndirnar.

Í politisku umrøðuni og umsitingarligu viðgerðini av hesum máli hevur verið arbeitt út frá tí fortreyt, at integratión gerst partur av málsøkjunum hjá Trivnaðarnevndini eldri & bústaðir.

Lógargrundarlag:
Við heimild í kommunustýrislógini ásetur kommunustýrisskipanin, hvørjum málsøkjum ymsu býráðsnevndirnar varða av. Hetta verður gjørt í yvirlitinum, sum er viðfest kommunustýrisskipanini. Nevnda yvirlit verður sostatt at dagføra samsvarandi hesum tilmæli, um tað verður samtykt.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samlað er talan um eina útreiðsluneutrala broyting, við tað at áður nevnda játtan á 100.000 kr. av rakstrarstaði undir høvuðskontubólki 1 verður flutt haðani og til høvuðskontubolk 2 til eitt nýtt rakstrarstað, sum verður nevnt "Integratión".

Integratónsnevndin verður at umsita hesa játtan, sum verður at brúka til tey átøk, sum sett verða í verk innan integratión.

Tilmæli:
Mælt verður til, at játtan á 100.000 kr. í inniverandi fíggjarætlan fyri 2021 verður flutt frá rakstrarstaði undir høvuðskontubólki 1 og til høvuðskontubolk 2 til eitt nýtt rakstrarstað, sum verður nevnt "Integratión".

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 4. juni 2021.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við Trivnaðarnevndini B&U, dagfest 15. juni 2021.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Nevndin tekur undir við E&B 15-06-2021.

Integratiónsnevndin 23. juni 2021:
Fundurin útsettur til eftir summarsteðgin.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá FíN 22-06-2021 einmælt samtykt.

115/21
21/00361-7 Møguligur forskúli – lýsing av møguleikum, fyrimunum og vansum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	15.06.2021	42/21
2 Fíggjarnevndin	22.06.2021	90/21
3 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	115/21

21/00361-7 Møguligur forskúli – lýsing av møguleikum, fyrimunum og vansum – trivnaðarnevndarformaðurin

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 4. juni 2021 um málið. Í stuttum snýr málið seg um, at býráðið í mars mánaði samtykti at seta ein arbeiðsbólk at kanna fyrimunir og vansar við at skipa ein forskúla á

Skúlatrød, og um møguleiki er fyri hesum; og at kanna, hvussu eitt møguligt forskúlatilboð í Klaksvík eigur at verða skipað, námsfrøðiliga og verkliga, sambært kunngerð nr. 108 frá 8. august í 2013 um skipan og læring í forskúla, og soleiðis at tað hóskar saman við teimum tilboðum, sum longu eru í skúlanum og í dagstovnunum.
Tíðarkarmurin var settur til, at bólkurin skuldi leggja sítt tilmæli fyri avvarðandi nevndir og býráðið í juni mánað, og tað er í hesum sambandi at hetta mál nú verður lagt fyri politisku skipanina til viðgerðar og støðutakan.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan (fólkaskúlalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019:

> § 4, stk. 4. Kommunum kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur.

Fíggjarligar avleiðingar:
Eru lýstar í álitinum.

Tilmæli:
Umsitingin mælir nevndum og býráð til at viðgera og taka prinsippiella støðu til møguleikan at seta á stovn forskúla á Skúlatrød út frá viðfesta áliti.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 15. juni 2021:
Ein meiriluti í nevndini, EyÓP, OáL, JC, mælir býráðnum til, at virksemið heldur fram við Fjallafípuni við verandi tilboði, har allur árgangurin áðrenn 1. flokk er savnaður, sum verður styrkt við eini *Jól til jól* líknandi skipan. Hetta sum eitt stig á vegnum móti forskúla, og at atlit verður tikið fyri hesum í 2. og 3. byggistigi á Skúlatrød. Meirilutin mælir somuleiðis til, at arbeitt verður víðari við at kanna, hvussu forskúlar aðrastaðni eru skipaðir, og at hetta verður at leggja fyri politisku skipanina aftur.

Ein minniluti í nevndini, JS og TJL, tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Nevndin tekur undir við, at virksemið heldur fram við Fjallafípuni við verandi tilboði, har allur árgangurin áðrenn 1. flokk er savnaður, sum verður styrkt við eini *jól til jól* líknandi skipan. Nevndin mælir eisini til, at Fjallafípan verður hoyrd.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá býráðsmeirilutanum til tilmælið frá FíN 22. juni 2021: "Nevndin tekur undir við, at virksemið heldur fram við Fjallafípuni við verandi tilboði, har allur árgangurin áðrenn 1. flokk er savnaður, sum verður styrkt við eini jól-til-jól líknandi skipan. Nevndin mælir eisini til, at Fjallafípan verður hoyrd.
Somuleiðis verður biðið um, at støðan til forskúla verður kannað víðari at leggja fyri politisku skipanina. Í mun til 2. og 3. byggistig á Skúlatrød verður atlit tikið til møguligan forskúla"; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB og ÓML) og 2 atkvøðum ímóti (JS og TJL). SVJ atkvøddi ikki.

116/21
21/00770-1 Byggisamtyktarbroyting - partur av B9 til A18

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.06.2021	95/21
2 Havna- og Vinnunevndin	16.06.2021	K-8/21
3 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	116/21

21/00770-1 Byggisamtyktarbroyting - partur av B9 til A18

Frágreiðing um málið:
Í samband við eigarskifti og harvið broytta nýtslu av matr.nr. 986a í Klaksvík verður uppskot um broyting av Almennu Byggisamtyktini galdandi fyri økispart B9 og A18 løgd fyri avvarðandi nevndir býráðsins til viðgerðar.
Uppskotið leggur upp til, at partur av økisparti B9 (vinnuøki) verður broyttur til A18 (Blandað íbúðar- og vinnuendamál).



Galdandi byggisamtykt



Uppskot til broyting

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, og tað upplagda í, at A18-økið hvørjumegin við matr.nr. 986a - við broytingini - verður samanhangandi, mælir Tekniska Fyrisiting til, at farið verður undir tilgongdina við byggisamtyktarbroyting, sum omanfyri lýst.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-06-2021.

Havna- og Vinnunevndin 16. juni 2021:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá UBN 14-06-2021 einmælt samtykt.

117/21
21/00693-3 Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.06.2021	94/21
2 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	117/21
3 Norðoyrarnevndin	31.08.2021	

21/00693-3 Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður tann 25. mai 2021 um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 25t í 3 sjálvstøðugar eigaraíbúðir.

Tekniska fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

- matr.nr. 25t er 456 m^2 til víddar.
- byggisamtyktarliga er talan um økispart A1, har minsta grundøkjavídd til íbúðir er ásett til 150 m^2
- vídd pr. íbúð er sostatt 152 m^2

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 11 um eigaraíbúðir

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini.
(Av tí at talan er um bygging, sum áður er kunnað um í Norðoyrarnevndini (mál 20/00048), mælir tekniska fyrisiting til at avgreiða aktuella sundurbýtismálið víðari til Umhvørvisstovuna eftir hetta fundarumfarið, fyri síðani at lata Norðoyrarnevndini tað til kunningar eftir summarsteðgin)

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-06-2021.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá UBN 14-06-2021 einmælt samtykt.

118/21
21/00669-3 Umsókn um makaskifti undir Fossum - matr.nr. 783g og 746b

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.06.2021	93/21
2 Tekniska Nevnd	16.06.2021	43/21
3 Fíggjarnevndin	22.06.2021	99/21
4 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	118/21

21/00669-3 Umsókn um makaskifti undir Fossum - matr.nr. 783g og 746b

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr.nr. 783g ger vart við, at partur av ogn hansara liggur úti í gongubreytini og skjýtur upp umbýti, soleiðis at kommunan yvirtekur gongubreytarlendið og afturfyri letur honum tilsvarandi vídd móti gongugøtuni norðanfyri.

Tekniska fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

- lendið hjá matr.nr. 783g undir gongubreytingin er uml. 27 m^2 til víddar

- við at lata matr.nr. 783g somu vídd norðanfyri smalkar kommunala gongugøtuøkið við uml. 1,10 metrum. (uml. 1,5 m eftir, har tað er smalast)

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Uml. kr. 2000,- fyri matrikulering (*Byggibúning Bústaðir*)

Tilmæli:
Miðað eigur at vera eftir, at øll privat lendi undir almennum vegi gerast kommunal. Mælt verður tí til at taka undir við ynskinum um makaskifti.
Havandi í huga óregluliga markið framvið norðursíðuni av gongugøtuni, verður samstundis mælt til at kanna møguleikan fyri upprætting av markinum millum matr.nr. 830a og 746b – hetta fyri at varðveita eina gøtubreidd uppá uml. 3 metrar

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-06-2021.

Tekniska Nevnd 16. juni 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 14-06-2021.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Nevndin tekur undir við TN 16-06-2021.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá FíN 22-06-2021 einmælt samtykt.

119/21
17/00642-86 Søluprísur fyri matr.nr. 42b, Syðradal

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	22.06.2021	95/21
2 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	119/21

17/00642-86 Søluprísur fyri matr.nr. 42b, Syðradal

Frágreiðing um málið:
Nærri verður greitt frá málinum í skrivi 17. juni 2021. Í samband við arbeiðið at útvega kommunalt grundøki á Syðradali er fyrisitingin nú komin har til at áseta ein hóskandi prís fyri matr.nr. 42b Syðradal. Nevnast skal, at kommunan hevur ikki havt nakran ítøkiligan fermetraprís fyri bústaðarlendi í Kalsoynni. Kommunan hevur havt útreiðslur av at útvega lendið, harumframt er neyðugt at útvega rottanga, tí ongin spillivatnsskipan er á Syðradali. Fyrisitingin metir tað eisini vera skynsamt at írokna óvæntaðar útreiðslur í søluprísin.

Ynskiligt er, at søluprísurin kemur at javna tær útreiðslur, ið kommunan hevur havt av at útvega stykkið.

Samlaði søluprísurin av stykkinum tekur útgangsstøði í keypi av lendi frá Búnaðarstovuni og neyðuga íbinding til kloakk, vatn, ravmagn og óvæntað.

Ísb. við íbinding hevur verið hugt at tveimum dømum, har fyrra dømið tekur útgangsstøði í almenna prísinum hjá kommununi fyri íbindingargjald fyri Kalsoy, meðan hitt dømið tekur útgangsstøði í eini leysligari meting av, hvat arbeiðið at útvega íbinding til grundstykkið kemur at kosta.

Uppskot til prís:

Uppskot A:

Gjald til Búnaðarstovuna	kr.	25.289,92
Útreiðslur ísb. við íbinding	kr.	15.950,00
Saml. útreiðslur	kr.	41.239,92
Óvæntað (10%)	kr.	4.123,99
Søluprísur:	kr.	45.363,91

Uppskot B:

Gjald til Búnaðarstovuna	kr.	25.289,92
Útreiðslur ísb. við íbinding	kr.	45.000,00
Saml. útreiðslur	kr.	70.289,92
Óvæntað (10%)	kr.	7.028,99
Søluprísur:	kr.	77.318,91

Lógargrundarlag:
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
Kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Uppskot A. kr. 45.363,91,-
Uppskot B. kr. 77.318,91,-

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir nevndini at taka støðu til, um matr.nr. 42b skal seljast fyri uppskot A ella uppskot B.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Nevndin mælir til ein prís á 120 kr./m^2 eins og í Árnafirði, og at keyparin rindar tinglýsingargjaldið.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá FíN 22-06-2021 einmælt samtykt.

120/21
21/00039-6 Byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 126a, Svínoy, Fuglark

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
Svínoyarnevndin	15.02.2021	5/21
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.06.2021	87/21
2 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	120/21

21/00039-6 Byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 126a, Svínoy, Fuglark

Frágreiðing um málið:
Býarskipanarbólkur fyri Klaksvíkar kommunu hevur í longri tíð arbeitt við at gera byggisamtykt fyri Svínoy. Hetta arbeiðið er komið so mikið áleiðis, at uppskot til byggisamtykt hevur verið til almenna hoyring, og eru á leið 15 viðmerkingar komnar inn, harav tvær viðmerkingar til matr. nr. 126a.

Meðan byggisamtykararbeiðið hevur verið í gongd, hevur ánarin á matr. nr. 126a tann 06.01.21 søkt kommununa um byggiloyvi til seyðahús í Svínoy. Tann 15.02.21 var málið til viðgerðar í UBN, har samtykt var at: *Nevndin mælir til, at bíðað verður við málinum, til uppskotið til byggisamtykt hevur ligið frammi til almenna hoyring, og møguligar viðmerkingar eru komnar til tað.*

Vísandi til UBN samtykina verður hetta byggimálið lagt fyri nú.

Sum kunnugt ynskir ánarin at byggja eitt seyðahús á matr.nr. 126a, sum er landbúnaðarøki, men sum í nýggju byggisamtyktini er útlagt sum eitt fríøki.

Um byggiloyvið verður játtað, er talan um eina tillaging av byggisamtyktini fyri Svínoy, og verður í hesum sambandi víst til tvinnar viðmerkingar, sum eru komnar inn undir hoyringini.

Fyrisitingin roknar við, at nevndir og býráð taka undir við hoyringarviðmerkingunum, tá málið seinni verður lagt fyri.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking.

Tilmæli:
Við hesum verður málið latið nevndini til viðgerðar.

Svínoyarnevndin 15. februar 2021:
Av tí at eingin byggisamtykt er fyri økið og av tí orsøk, at seyðhús eru í økinum, so mælir nevndin til at játta umsøkjaranum byggiloyvi sambært tekningum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. juni 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við, at umsøkjarin fær byggiloyvi til seyðahús á matr.nr. 126a.
Ein minniluti, SVJ, mælir til at leggja málið fyri Svínoyarnevndina við viðmerkingum til byggisamtykt, áðrenn støða verður tikin til hesa broytingina av byggisamtyktini.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá UBN 14-06-2021; tað fall við 1 atkvøðu fyri (SVJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB og ÓML). JS og TJL atkvøddu ikki.
Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið frá UBN 14-06-2021; tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, ÓML, JS og TJL). SVJ atkvøddi ikki.

121/21
21/00768-2 Umsókn um frávik frá kravi um tal av parkeringsplássum og stødd av lendi pr. íbúð í samb. við ætlaða bygging við Kirkjubrekku

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.06.2021	96/21
2 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	121/21

21/00768-2 Umsókn um frávik frá kravi um tal av parkeringsplássum og stødd av lendi pr. íbúð í samb. við ætlaða bygging við Kirkjubrekku

Frágreiðing um málið:
Eitt smápartafelag ætlar at byggja ein bygning við fýra íbúðum og hølum til eina fyritøku við handli. Grundøkið er 498 m^2. Søkt verður um frávik, so allar íbúðirnar, ella í minsta lagi tvær av teimum, kunnu frámatrikulerast og harvið seljast.
Somuleiðis verður søkt um frávik fyri kravi um tal av parkeringsplássum frá 1,5 parkeringspláss til 1 parkerigspláss fyri hvørja íbúð.

Lógargrundarlag:
Byggisamtyktin, øki A8: *Blandað íbúðar- og miðstaðarendamál. Grundøkjavídd (í minsta lagi) 300 m^2 fyri vanlig sethús og 200 m^2 fyri samanbygd hús*

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Økisásetingarliga er ikki heimild fyri at frámatrikulera til minni enn 200 m^2, men vilja vit mæla til at hava somu áseting til íbúðarbygging eins og á Norðoyri og á Helnabrekku (150 m^2 fyri samanbygd hús og íbúðir).

Tekniska fyrisiting hevur umrøtt umsóknina um frávik fyri parkeringsplássum. Mett verður, at økið (A8) hevur ov fá almenn parkeringspláss, og mæla vit tí frá at geva frávik í hesum føri.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-06-2021.
Nevndin mælir til at geva umsitingini heimild til at finna eina loysn upp á parkeringsspurningin.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Einmælt samtykt at taka undir við somu økisáseting til íbúðabygging eins og á Norðoyri og á Helnabrekku (150 m^2 fyri samanbygd hús og íbúðir) í øki A8 og at geva umsøkjaranum frávik frá kravinum um tal av parkeringsplássum til handilsvirksemið, sambært innsendari skitsu.

122/21
21/00742-3 Atløgubryggja í Árnafirði, í samband við tunnilsarbeiði - Articon

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	16.06.2021	38/21
2 Fíggjarnevndin	22.06.2021	101/21
3 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	122/21

21/00742-3 Atløgubryggja í Árnafirði, í samband við tunnilsarbeiði - Articon

Frágreiðing um málið:
Samskifti hevur verið millum Articon og Klaksvíkar kommunu um eina fyribilsbryggju í Árnafirði í samband við arbeiðið at gera nýggjar tunlar Norður um Fjall, og 2. juni 2021 sendir Articon umsókn um byggiloyvi til eina fyribils atløgubryggju, har felagið skal taka tunnilsamboð og aðra útgerð upp á land.

Í øðrum lagi søkir felagið um byggiloyvi til eina varandi bryggjuloysn, sum Klaksvíkar kommuna kann yvirtaka í 2023, og um so er, verður bryggjan projekterað og dimensionerað sambært normum og reglum, sum eru galdandi fyri tílíkar bryggjur.

Víðari sigur Articon, at er áhugi fyri hesari loysnini, so er neyðugt, at partarnir gera avtalu um yvirtøku, áðrenn arbeiðið byrjar, so bryggjan verður gjørd við hesum fyri eyga. Málið hevur skund, upplýsir Articon.

Fyrisitingarligar viðmerkingar:
Kommunan hevur ikki gjørt mun á fyribils- og varandi bryggjum. Allar bryggjur í kommununi, sum hugsast kunnu at verða brúktar alment, skulu halda galdandi krøv um styrki, haldbari o.a. Spurningurin kann einans vera um livitíð, fendara og installasjónir.

Kommunan kann fyribils einans geva eitt byggiloyvi til bryggjuna, sum í fyrsta lagi er galdandi fyri t.d. 3 ár, tí samtykta víðkanin av byggisamtyktini fyri havnaøkið í Árnafirði - har ætlanin er at byggja kaina - er ikki endaliga góðkent.

Fyrisitingin kann viðmæla, at arbeitt verður víðari við einari varandi bryggjuloysn í Árnafirði.

Upplýst verður, at leiðslan fer at taka hetta og onnur mál upp á einum fundi, sum verður við Articon mánadagin 7. juni 2021, og kunnu aðrar upplýsingar s.s. kostnaðir o.a. gerast tøkar, tá nevndirnar hava sínar fundir komandi umfar.

Víst verður annars til viðheft tilfar.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Kostnaðurin av einari varandi bryggjuloysn er 4,5 mió. kr. uttan meirvirðisgjald fyri tann partin, sum Articon ikki skal brúka. Upphæddin stavar frá útboðskostnaði av líknandi bryggju, sum Articon hevur framt fyri annan arbeiðsánara.

Um kommunan ynskir hesa bryggjuloysnina í Árnafirði, so er neyðugt, at Klaksvíkar Býráð bindur seg til at seta 4,5 mió. kr. av til íløgur á fíggjarætlanini fyri 2023.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til støðutakan.

Havna- og Vinnunevndin 16. juni 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Nevndin tekur undir við, at Klaksvíkar kommuna bindur seg til at seta 4,5 mió. kr. av til íløgur á fíggjarætlanini fyri 2023 fyri at yvirtaka bryggjuna.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Ein meiriluti, KHJ, OáL og TJL, tekur undir við HaVN 16-06-2021.
JS tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá JS: *Vísandi til, at ein binding áljóðandi 4,5 mió. kr. kann ávirka skuldarálíkningina hjá kommununi, mæli eg til, at málið verður tikið upp seinni*; tað fall við 2 atkvøðum fyri (JS og SVJ) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB).

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið í FíN 22-06-2021; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, ÓML, TJL) og 2 atkvøðum ímóti (JS og SVJ).

123/21
21/00755-4 Ábøtur á ognirnar hjá Norðoya Fornminnasavni 2021 – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	15.06.2021	51/21
2 Fíggjarnevndin	22.06.2021	84/21
3 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	123/21
4 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	

21/00755-4 Ábøtur á ognirnar hjá Norðoya Fornminnasavni 2021 (flyting millum kontur)

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini 5. juni 2021 verður greitt nærri frá málinum.
Nýggja nevndin fyri Norðoya Fornminnafelag hevur á fundum víst á ynskið um at gera ábøtur á bygningarnar hjá felagnum í Klaksvík; fremsta raðfestingin er at mála tak og klædning á handilshúsunum, og hetta er tilsamans mett at kosta 330.000 kr.
Klaksvíkar kommuna hevur í fleiri ár játtað pengar til ábøtur á ognir hjá fornminnasavninum, men ein avbjóðing hevur verið at fáa arbeiðini gjørd, og til fíggjarætlanina í ár varð onki sett av.

Ein bygningskonta er hjá Føroya Fornminnissavni, sum eigur at kunna játta krónu fyri krónu til ábøtur, og vísir tað seg út ímóti sumri, at ein upphædd gerst tøk har, so fer Norðoya Fornminnasavn at søkja, um kommunan eisini játtar sín part.

Verður ein upphædd játtað til nevndu ábøtur, so verður mælt til, at kommunan rindar, tá arbeiðið er gjørt og fær innlit í tær rokningar, sum liggja til grund fyri arbeiðinum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ein møguleiki er at flyta kr. 200.000 frá verkætlanini *kappróðrarneyst* á fíggjarætlanini í 2021, havandi í huga at neystið ikki verður liðugt í ár, og møguleiki er fyri at gera hesar ábøtur á handilshúsini í ár.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka støðu til møguligan stuðul á kr. 200.000 til ábøtur á handilsbygningin úti í Klaksvík við fyribils flyting frá *kappróðrarneystinum*, sum hædd verður tikin fyri í samband við fíggjarætlanina fyri 2022.

Mentanarnevndin 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-06-2021.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við MeN 15-06-2021.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við tilmælinum men mælir til, at peningurin verður fluttur frá *fastognum*.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið í FíN 22-06-2021; tað fall við 2 atkvøðum fyri (JS og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB). ÓML og SVJ atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 22-06-2021; tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, ÓML, TJL og SVJ) og ongari ímóti. JS atkvøddi ikki.

124/21
17/00260-205 Ávís tillagan av verkætlan undir Hamri – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	19.05.2021	28/21
2 Fíggjarnevndin	25.05.2021	73/21
3 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	89/21
4 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	124/21

17/00260-205 Ávís tillagan av verkætlan undir Hamri

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. mai 2021.

Havna- og Vinnunevndin 19. mai 2021:
Nevndin tekur undir við at økið til bátapláss verður víðkað til 3200m2 í 2021 og at peningur verður settur av til betongplatt og bátadrátt í fíggjarætlanini fyri 2022.

Fíggjarnevndin 25. mai 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við HaVN 19-05-2021.
Ein minniluti, JS, tekur undir við HaVN 19-05-2021, men at peningurin verður at taka upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2022.

Klaksvíkar Býráð 27. mai 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá FíN 25-05-2021; tað fall við 2 atkvøðum fyri (JS og SVJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, OáL, GvK, JCC, EÓP og ASB); ÓML og TJL atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 25. mai 2021; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, OáL, GvK, JCC, EÓP, ASB, ÓML og TJL) og ongari atkvøðu ímóti; JS og SVJ atkvøddu ikki.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atkvøtt varð tilmælið frá BýR 27-05-2021; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, OáL, GvK, JCC, EÓP, ASB, ÓML og TJL) og ongari atkvøðu ímóti; JS og SVJ atkvøddu ikki.

125/21
20/00068-31 Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e) – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.05.2021	72/21
2 Mentanarnevndin	18.05.2021	45/21
3 Havna- og Vinnunevndin	19.05.2021	31/21
4 Tekniska Nevnd	19.05.2021	34/21
5 Fíggjarnevndin	25.05.2021	74/21
6 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	90/21
7 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	125/21

20/00068-31 Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e)

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. mai 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. mai 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-05-2021.

Mentanarnevndin 18. mai 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 17-05-2021, tó við teirri viðmerking, at partur Mentanarnevndarinnar verður at taka av *Ítróttarøkið, Íløgur* (Spæliland) í staðin.

Havna- og Vinnunevndin 19. mai 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 18-05-2021.

Tekniska Nevnd 19. mai 2021:
Nevndin tekur undir við HaVN 19-05-2021.

Fíggjarnevndin 25. mai 2021:
Nevndin tekur undir við TN 19-05-2021.

Klaksvíkar Býráð 27. mai 2021:
Tilmælið frá FíN 25-05-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá BýR 27-05-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

126/21
21/00072-6 Vegir, Íløgur - staðfest inntøka í 2021 – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	19.05.2021	33/21
2 Fíggjarnevndin	25.05.2021	68/21
3 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	91/21
4 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	126/21

21/00072-6 Vegir, Íløgur - staðfest inntøka í 2021

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. mai 2021.
07-05-2021
Heri M. Hammer *Óla Jákup Bech*
Býarverkfrøðingur *Tekniskur stjóri*

Tekniska Nevnd 19. mai 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-05-2021.

Fíggjarnevndin 25. mai 2021:
Nevndin tekur undir við TN 19-05-2021.

Klaksvíkar Býráð 27. mai 2021:
Tilmælið frá FíN 25-05-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá BýR 27-05-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

127/21
21/00073-9 Staðfest inntøka innan økið hjá UBN í 2021 – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.05.2021	70/21
2 Fíggjarnevndin	25.05.2021	69/21
3 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	92/21
4 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	127/21

21/00073-9 Staðfest inntøka innan økið hjá UBN í 2021

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. mai 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. mai 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-05-2021.

Fíggjarnevndin 25. mai 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 17-05-2021.

Klaksvíkar Býráð 27. mai 2021:
Tilmælið frá FíN 25-05-2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá BýR 27-05-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

128/21
21/00622-1 Eykajáttan til NBH 2021 – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	18.05.2021	21/21
2 Fíggjarnevndin	25.05.2021	71/21
3 Klaksvíkar Býráð	27.05.2021	93/21
4 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	128/21

21/00622-1 Eykajáttan til NBH 2021

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 27. mai 2021.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 18. mai 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-05-2021, og at eykajáttanin verður fíggjað av tøkum peningi, herundir tann peningurin, sum er fluttur aftur frá NBH í smb. við avlopið 2020.

Fíggjarnevndin 25. mai 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við E&B 18-05-2021, men í samband við at nýggjar upplýsingar eru í málinum, verður heitt á NBH um at koma við nærri útgreining av málinum viðv. bilum og venjingartilboði á Viðareiði, sum verður lagt fyri NBH-stýrið aftur.
JS tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 27. mai 2021:
Atkvøtt varð um uppskot frá Jógvani Skorheim um at beina málið aftur í nevnd; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Jógvani Skorheim: "*Mælt verður til at taka undir við málinum, men at peningurin, sum ætlaður er til LEASING av bilum, heldur verður brúktur til at betra um normering á eldraøkinum.*"; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 25-05-2021; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB og ÓML) og ongari atkvøðu í móti; JS, SVJ og TJL atkvøddu ikki.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atkvøtt varð tilmælið frá BýR 27-05-2021; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB og ÓML) og ongari atkvøðu ímóti; JS, SVJ og TJL atkvøddu ikki.